TING-HELLAN

# Fiskivinnupolitikkurin verður óbroyttur

**Eingi tikin eru í løtuni um, at ES ætlar at broyta fiskivinnupolitikkin, og tí er føroyskur limaskapur ógvuliga ivasamur, og er hetta heldur ikki á dagsskrá í Føroyum í løtuni sigur Hákun J. Djurhuus, føroyskur sendimaður í Brússel**

TINGHELLA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Enn eru eingi tekin í hvørki sól, mána ella korridorum í Brússel, at ES hevur ætlanir at broyta felags fiskivinnupolitikkin, soleiðis at ávís umsøkjaralond, eitt nú Noreg og Ísland, kunna fáa sersømdir við einum møguligum limaskapi. Men, viðurskiftini broytast stundum, og tí skal hetta ikki avvísast sum ein møguleiki í framtíðuni.

Hetta er metingin hjá føroyska eygleiðaranum í Brússel, Hákun Jógvansson Djurhuus.

- Eingi tekin eru í løtuni um, at ES ætlar sær at broyta sín sentralt stýrda fiskivinnupolitikk, og hetta, umframt politiska veruleikan í Føroyum útilokar mestur føroyskan limaskap útfrá kjakinum higartil, sigur Hákun J. Djurhuus.

## Arbeiðsbólkur settur

Búskaparfrøðingurin Óli Samró segði fyrst í apríl mánaði, at hann metir ikki, at fiskivinnan í framtíðini verður sentralt stýrd úr Brússel.

Óli Samró hevur í trý ár tikið lut í ein samstarvi í greinar búskaparligu gongdina í fiskivinnuni í Evropa.

- Í greiningini verður Europa býtt í fimm økir – Miðalhavið, Eystursjógvurin, Norðsjógvurin meðan Atlantshavið verður býtt í suður og norð.

- Tað skal undra meg, um tað ikki verður møguligt at býta umsitingina av tilfeinginum á sama hátt: Antin beinleiðis til limalondini ella eftir regionalum økjum, um tríggjar so sterkar fiskiveiðutjóðir sum Norra, Ísland og Føroyar blíva limir í ES við kravið um decentrala umsiting, segði Òli Samró á Tinghelluni.

## Kunnu ikki siga

At Norra, Ísland og Føroyar saman standa sterkari mótvegis ES er Hákun J. Djurhuus samdur við Óla Samró í, men hann ynskir ikki at gera fleiri viðmerkingar.

Tað eru nógvar óvissur í sambandi við tættari samstarv við ES, vísir Hákun Djurhuus á.

- Vit kunnu ikki siga, at tað júst verður soleiðis og soleiðis, um Føroyar fáa limaskap í ES ella verða knýtt tættari, sigur Hákun J. Djurhuus.

- Tað týdningarmesta er, at føroyingar taka eina støðu til, hvat vit vilja í mun til ES, sigur føroyski sendimaðurin í Brússel.

Føroyski sendimaðurin vil ikki gera viðmerkingar til støðið á føroyska kjakinum, men hann leggur dent á, at tað er ótrúliga týdningarmikið, at ES-spurningurin verður partur av almenna orðaskiftinum.

- Tað er tó sera tídningarmikið at hava í huga, at eingin vissa er í, at júst limaskapur er rætta loysnin fyri Føroyar. Tí er tað eisini sera umráðani at hol er sett á kjakið í Føroyum, soleiðis at ein júst kann koma víðari frá verandi støðu og møguliga finna røttu rókina hjá Føroyum í evropiska bygnaðinum, sigur Hákun J. Djurhuus.

## Ikki bert fiskur

Vit eiga tí í viðgerðini av framtíðar støðu okkara mótvegis ES, at vigað samanlagt fyri og ímóti. ES er ikki bert fiskur. Tað er givið, at tað hevur vansar við sær at liggja fjarskotin langt úti í Atlantshavi, sum eitt pinkulítið oyggjaland. Men fyrimunurin við avmarkaðu støddini er, at vit skjótt tillaga samfelagið nýggjum umstøðum. Hetta kann gerast ein trupuleiki í eini tungari ES skipan. Tí skulu vit eisini taka støðu til, um vit ynskja henda fleksibilitet og so brúka meiri orku uppá at fáa avtalur við ES á ávísum økjum, men ikki geva amboðið frá okkum at tillaga samfelagið til broytandi viðurskiftir, ella at vit velja at gera alt í einum ES karmi, sum gevur atgongd til alt kervið, men samstundis bindir okkum til allan bygnaðin við teim fyrimunum og vansum tað hevur við sær.



# Nógvir møguleikar

**Føroyar verða virdar sum onnur líknandi lond í Brússel. Serliga í fiskivinnuhøpi standa Føroyar sterkt í myndini, sigur Hákun J. Djurhuus, føroyskur sendimaður í Brússel**

TINGHELLA
*Heri á Rógvi*
*Heri@sosialurin.fo*

Í september gongur leiðin til enska høvuðsstaðin, London. Tá hevur steðgurin verið fimm ár. Sum umboð fyri tað føroyska fólkið hevur hann gingið aftur og fram á politisku korridorunum á ES høvuðsborgini. Millum embætisfólk, politikarar og lobbyistar hevur samfelagsfrøðingurin Hákun Jógvansson Djurhuus sum at kalla einsamallur føroyingur arbeitt fyri at fremja føroyskt áhugamál. Ein einsamallur riddari seinasti fimm árini.

- ES er í nógvar mátar eitt stórveldi við 25 limalondum og tveimum væl ávegis limaskapi. Í Brússel starvast 24.000 embætisfólk hjá ES Nevndini, men tað er væl minni enn kommunala umsitingin í fleiri av ES limalondunum, sigur Hákun J. Djurhuus.

Føroyski sendimaðurin heldur, at Føroyar verða tikið í álvara og virt innanveggja í Brússel.

- Vit verða vird sum flest øll onnur lond, men vit eru nokk ikki tað fyrsta landið, ES Nevndin vendir eyguni móti at leita íblástur til evropiska rákið.

- Í mun til okkara støðd geva hini londini okkum nógvan ans – serliga sum fiskivinnutjóð, sigur Hákun J. Djurhuus. Tað er ikki óvanligt at føroyska fiskidagaskipanin verður umrødd í ES Tingunum sum fyrimynd, tá kjakast verður um broytingar í sambandi við felags fiskivinnupolitikk ES

Hann nevnir eisini sum dømi, at í fiskiveiðusamráðingunum eru stundum 48.000 føroyingar upp ímóti heili fimmhundrað milliónum fólkum á ES síðuni.

## Nógvir møguleikar

Føroyar hava sum er ein handilssáttmála við ES. Hesin var av fyrstan tíð gjørdur í 1991, og er síðani broyttur í 1996 og 1998. Við seinastu broytingunum eru bert fýra kvotur eftir í útflutninginum hjá Føroyum til ES. Kvotur eru enn á pilkaður rækjum, fiskafóðuri, sílum og ávísum niðursjóðaðum vørum. Heilsufrøðiligur sáttmáli er knýttur at handilssáttmálanum í 2001.

Fleiri møguleikar eru fyri tættari samstarvið millum Føroyar og ES. Løgmaður vitjaði fyri stuttum í Brússel, har framtíðarviðurskifti ES og Føroyar millum vóru umrødd, og møguleikar fyri tættari samstarvi.

Samstarvið við ES kann í mesta lagi gerast til føroyskan limaskap. Hákun J. Djurhuus metir tað vera ógvuliga ósannlíkt, at ein limaskapur umvegis Danmark kann koma upp á tal, sum eitt nú Áland hevur umvegis Finnland. Grundað á politiska støðuna í Føroyum, og støðuna Føroya og Danmarkar millum.

Í løtuni fylgir landsstýrið einum leisti líkur tí hjá Sveis.

- Sveis hevur í løtuni eina handilsavtalu og sjey seravtalur knýttar at upprunasáttmálanum. Ein tílík loysn gevur eisini nógvar av teimum fyrimunum, sum EBS samstarvið gevur, sigur Hákun J. Djurhuus.

## Økt umsiting

Spurningurin um føroyskan limaskap er ikki á dagsskrá í Føroyum. Men hóast Føroyar ikki gerast limir, so vil eitt tættari samstarv krevja økta umsiting.

- Íslendingar hava í løtuni tjúgu fólk frá almennari síðu í Brússel. Tað er greitt, at eitt samstarv innan fleiri øki við ES, sum gransking, útbúgving osfr. Kemur at krevja økta umsiting og fleiri fólk á sendistovuni, sigur Hákun J. Djurhuus.

Sum er kostar føroyski sendimaðurin í Brússel umleið 1,4 milliónir krónur árliga.